

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 12 - 2012

# Føroyingar fegnast um arbeiðið í Norra

Føroyingar fáa nýggjar avbjóðingar og royndir við at arbeiða í norsku oljuvinnuni. Hetta kann koma væl við í eini komandi føroyskari oljuvinnu halda Hjalti Joensen og Meinhard Fróði Højgaard, sum nú í fleiri ár hava arbeitt í útlandinum. Dámar væl Tá Oljan.fo vitjaði á Skála herfyri hittu vit tveir av monnunum, sum arbeiða hjá Faroe Offshore Service í Noregi. Annar teirra er Hjalti Joensen, toftamaður, búsitandi í Runavík og við útbúgving sum elektrikari og elektronikteknikkari. Áðrenn hann fór til Norra arbeiddi hann nógv ár á eltalvuvirkinum í Gøtu. Í fleiri ár arbeiddi hann í norsku oljuvinnuni, eitt nú á gassverkinum á Melkøya í Norðurnorra. Í fjør fekk hann arbeiði hjá Faroe Offshore Service og hevur verið har síðani. Honum dámar væl arbeiðið og umstøðurnar. 14 dagar í Norra og 21 dagar heima. Og lønin er góð. Øðrvísi og størri Alt er øðrvísi og størri. Um fakligheitin ikki er so nógv størri so arbeiðir tú kortini í einum øðrum samanhangi og umhvørvi og sær eisini, hvussu tann verðin er skrúvað saman. Jú tú lærir og sær nógv, sum tú ikki ger í Føroyum. Hjalti heldur tað eisini vera gott fyri eina komandi føroyska oljuvinnu, at so nógvir føroyskir handverkarar hava roynt seg í hesi vinnu í útlandinum. Tá kunnu teir vera klárir til uppgávur í Føroyum í framtíðini eisini. Royndur toftamaður Meinhard Fróði Højgaard er somuleiðis toftamaður og er fegin um arbeiðið í Norra. Hann lærdi til elektrikara hjá Elektro og var har í nøkur ár. Hann er eisini ein, sum hevur havt nógvar royndir í norsku oljuvinnuni og hevur verið har síðani ár 2000. Hann var eisini ein av teimum mongu, sum arbeiddu á Melkøya. Í fjør fór Meinhard at arbeiða hjá Faroe Offshore Service. Hann hevur tí drúgvar royndir á nógvum økjum í Norra frá at draga káplar í Hammerfest til og røkja arbeiðið sum formaður við 10 til 20 fólkum undir sær. Tá Cosl Pioneer fór at bora á landgrunninum í summar var Meinhard ein av hepnu føroyingunum, sum

varð til arbeiðis umborð á pallinum. Hann dylur ikki fyri, at hann er ikki sørt errin av at hava verið ein av teimum fyrstu føroyingunum, sum eru farnir beinleiðis av flogvøllinum í Føroyum til arbeiðis á boripalli á tí føroyska landgrunninum. Og framvegis eru fleiri føroyingar við Cosl Pioneer. Hann vísir á, at føroyingar í dag eiga fólk við drúgvum royndum á nógvum økjum, at tað í framtíðini átti at verið eitt krav til feløg, sum bora her, at tey brúktu føroysku arbeiðsmegina. Fleiri fyrimunir eru eisini hjá norðmonnum at brúka føroyingar. Tað er lættari at samskifta við føroyingar enn t.d. estlendingar og aðrar útlendingar. Teir eru heldur ikki so fleksiblir sum vit føroyingar. Fáa vit eina uppgávu so gera vit hana. Skilagott Meinhard heldur eisini, at tað er skilagott at senda fólk av landinum at arbeiða í oljuvinnuni. Tá tú kemur í hesa vinnu, mást tú skúlast upp av nýggjum. Einki er líka sum tað tú lærir heima. Og hetta kann gerast ein góður førningur víðari í arbeiðslívinum. So toftamaðurin ivast onga løtu í, at oljuvinnan í Norra er ein góð vinna nógv ár aftrat hjá føroyingum at arbeiða. Hann heldur eisini, at hetta kann vera góð lopfjøl til at fara víðari og lesa til verkfrøðing. Vit skulu menna okkum meira, so vit eisini kunnu átaka okkum arbeiði í eini komandi oljuvinnu í Føroyum. Meinhard heldur eisini, at krevjandi trygdarumhvørvið í útlendsku oljuvinnuni er nakað, sum vit føroyingar eiga at leggja okkum í geyma. Tað er nakað, sum Føroyar í framtíðini kunnu fáa gagn av. Mynd Hans Jákup Johannesen, stjóri á Faroe Offshore Service saman við tveimum av sínum dugnaligu og trúgvu elektrikarum, Hjalta Joensen og Meinhard Fróða Højgaard. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller